## Fólkafundurin á Skarðinum

Um viðrar verður árligi fólkafundurin á Skarðinum sunnudagin, 5. august. Farið verður til gongu niðan frá kunningarstovuni/bókasavninum kl. 14. Byrjað verður uppi á Skarðinum uml. kl. 15. Sum undanfarin ár verður hugni við felagssangi og røðu. Røðarin í ár er Kristin Poulsen, fyrrv. lærari. Verið væl klødd og skødd. Øll eru vælkomin, sigur Fuglafjarðar Fornminnisfelag, skipar fyri.

## Vøksturin í lønargjaldingunum heldur fram í 2. ársfjórðingi 2007

Lønargjaldingarnar annan ársfjórðing vóru 9 prosent hægri enn annan ársfjórðing í fjør. Vøksturin, sum var fyrsta ársfjórðing heldur sostatt fram, hóast hann er eitt vet minni. Annan ársfjórðing vóru samlaðu lønargjaldingarnar 1,7 miljard móti 1,6 miljard í fjør. Í teimum einstøku vinnugreinunum finna vit størsta procentvísa vøkstur innan landbúnað. Fyrsta ársfjórðing vuksu lønargjaldingarnar her heili 58 prosent, meðan vøksturin annan ársfjórðing var 39 prosent, sammett við somu ársfjórðingar árið fyri. Her er tó talan um sera smá tøl í samlaðu lønargjaldingunum, 5,5 miljónir higartil í ár ímóti 3,8 miljónum fyrra hálvár í fjør. Meðan tað var ein minking í lønargjaldingunum innan fiskavirking fyrsta ársfjórðing uppá 11 prosent, er tað ein vøkstur annan ársfjórðing uppá 6 prosent. Samlað fyri fyrra hálvár er sostatt enn talan um eina lítla minking uppá 4 prosent. Í krónum er tað serliga fiskiskapur, byggivinna, handil og umvæling og almenn fyrisiting, sum bera vøksturin í lønargjaldingunum. *kelda: www.hagstova.fo*

# Hitabylgja í politiska kuldanum

**Kjak: Enn ein bulur varð lagdur á politiska bálið í heitasta summarmálinum, tá løgmaður í løgmansrøðuni boðaði frá, at uppskotið um Føroyar sum eitt valdømi eigur at verða sent til fólkaatkvøðu**

VALSKIPAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*




Vit hava heitt á ymisk fólk, sum mugu metast at hava skil fyri slíkum, um at svara tveimum greiðum spurningum:

- Hvat heldur tú um uppskotið hjá løgmanni um at senda spurningin um eitt valdømi til fólkaatkvøðu?

- Hvat heldur tú um uppskotið hjá løgtingsformanninum um Føroyar sum eitt valdømi?

Tað kom helst púra óvæntaðu á fólk, tá løgmaður á ólavsøku segði, at málið um eitt valdømi átti at verða sent til fólkaatkvøðu. Hetta samstundis sum tað longu hevur verið greitt í nakrar mánaðir, at Edmund Joensen, samgongulimur og løgtingsformaður, ætlar at leggja uppskotið um eitt valdømi fyri tingið í heyst.

Fyri Sosialinum hevur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sagt, at tað helst er best at bíða við fólkaatkvøðuni og uppskotinum um eitt valdømi til eftir valgið, ið eftir øllum verður 19. januar. Hetta fyri at málið ikki skal gerast partur av einum beiskum valstríði. Kortini eru ongar broytingar at hóma hjá Edmundi Joensen, sum eisini yvir fyri Sosialinum hevur boðað frá, at hann kortini ætlar at leggja uppskotið fram í heyst. Samstundis hevur hann sagt, at bæði uppskotið um eitt valdømi og um fólkaatkvøðu kunnu verða løgd fram og viðgjørd undir einum í tinginum.

Síðani hava bæði føroyingar og frøðingar givið hugsanir sínar um málið til kennar. Eitt nú hevur Sonja Jógvansdóttir, stjórnmálafrøðingur, sagt við Sosialin, at løgmaður flýggjar undan ábyrgdini, sendir hann málið til fólkaatkvøðu. Sjúrður Skaale, eisini stjórnmálafrøðingur, segði við útvarpið hjá Kringvarpinum, at fólkaatkvøða fer at seta kílar millum fólk í mið-staðarøkinum og útjaðaranum, og at vandi er fyri einum sera hørðum valstríði kenna valevnini seg knappliga hótt. Eins og mong onnur tók hann fyri givið, at tað verða valevnini í útjaðaranum, ið fara at kenna seg hótt verður eitt valevni veruleiki.

# Týdningarmikið við góðari byrjan

**Hans Andrias Sølvará, søgurfrøðingur, metir, at ein fólkaatkvøða ikki er rætta byrjanin upp á eina nýggja valskipan, tí avgerandi er, at hon verður væl móttikin hjá fólki. – Nú er vandi fyri at valdømini fara at setast upp móti hvørjum øðrum, sigur hann**

VALSKIPAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Hans Andrias Sølvará er søgufrøðingur við hjágrein í heimspeki.

- Hvat heldur tú um uppskotið hjá løgmanni um at senda spurningin um eitt valdømi til fólkaatkvøðu?

- Tað er ringt at argumentera ímóti eini fólkaatkvøðu, men hetta er ikki rætti konteksturin.

Tað sigur Hans Andrias Sølvará, sum metir, at ein fólkaatkvøða ikki er rætti matin at byrja eina nýggja valskipan. Søgufrøðingurin vísir á, at eins og onnur higartil hava borið fram, so er vandi fyri, at valdømi fara at seta seg upp ímóti valdømi í eini fólkaatkvøðu, og hetta kann kann skapa presedens ella fordømi, ið gera, at fólk framvegis fara at atkvøða lokalt eftir eina broyting. Hans Andrias Sølvará sigur, at tað í stóran mun eru tær óskrivaðu lógirnar, tann politiska mentanin og mannagongdirnar, ið eru avgerandi fyri, hvussu ein skipan kemur at roynast.

- Ein skipan ella ein lóg eru ikki nøkur trygd í sær sjálvum, sigur hann, og sipar til avleiðingarnar, um fólkið ikki tekur skipanina til sín eftir eina fólkaatkvøðu, har øki í landinum kunnu verða sett upp ímóti hvørjum øðrum.

### Føroyar kunnu ikki samanberast við Grønland

Hans Andrias Sølvará metir tí, at politikararnir eiga at vera so mikið vaksnir, sum hann tekur til, at tey eiga at taka hesa avgerðina sjálvi, tí annars er vandi fyri, at ein nýggj valskipan ikki fær ta røttu byrjanina. Ein nýggj byrjan er nevniliga altavgerandi fyri, hvussu ein slík kemur at roynast hjá fólkinum, metir Hans Andrias Sølvará.

- Taka fólk hetta ikki til sín, so skapa vit skeivt fordømi.

- Hvat heldur tú um uppskotið hjá løgtingsformanninum um Føroyar sum eitt valdømi?

- Eg havi altíð hildið, at tað hevur verið tað rætta fyri at sleppa undan lokalpolitikki. Vit hava brúk fyri landspolitikki, sigur Hans Andrias Sølvará.

Ofta verður Grønland brúkt sum ræðumynd, tá tosað verður um eitt valdømi. Hans Andrias Sølvará viðgongur, at hann ikki kennir nóg væl viðurskiftini í Grønlandi, men metir kortini, at tað ikki ber til at samanbera Føroyar og Grønland, av tí at teinarnir millum bygdu økini í Føroyum og Grønlandi eru so ymiskir.